Høgni Hoydal
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um viðgerðir og bíðilistar í heilsuverkinum undir koronu, settur landsstýrismanninum í heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvussu er støðan hjá sjúklingum, sum hava fingið útsett diagnostisering og viðgerðir í koronutíðini?

2. Hjá hvørjum bólkum og á hvørjum økjum eru flestar diagnostiseringar og viðgerðir útsettar og seinkaðar – í tølum?

3. Hvussu er býtið millum diagnostisering og viðgerðir á teimum trimum sjúkrahúsunum í Føroyum, og hvussu eru tølini fyri uttanlandsviðgerðir?

4. Hvussu eru tíðarætlanirnar fyri teir ymsu bólkarnar, har diagnostisering og viðgerðir eru útsettar?

5. Hvussu er lagt upp fyri á fíggjarlógini, at diagnostisering og viðgerðir eru útsettar?

Viðmerkingar:

Í koronutíðini hevur heilsuverkið umlagt og útsett viðgerðir hjá nógvum fólki.

Tí verður spurt, hvussu støðan er hjá ymsum bólkum, og hvørjar tíðarætlanirnar eru fyri viðgerðir.

Á Løgtingi, 15. desember 2020

Høgni Hoydal